Vi›merking

Uppdikta›ur trupulleiki

Politisku flokkarnir í Føroyum hava uppdikta› stóra ríkis-trupulleikan í núverandi ríkisskipan okkara. Allir politiskir flokkar yvirbjó›a hvønn annan vi› n‡ggjum framtí›ar uppskotum, men hvar er tann grundleggjandi trupulleikin?

Kostna›armikla oyggjalandi›

Føroyar hevur bert veri› atvoldin til útrei›slur og trupulleika, mett frá danskari sí›u, og ta› er hetta, sum kann gerast okkara lagna.

Ta› besta fyri danska skattgjaldaran er óiva› at sleppa av vi› kostna›armikla oyggjalandi›, og ta› tykist, flestu danir t hava hesa uppfatan samstundis, sum teir eru gó›ir vi› sítt oyggjafólk.

Vit føroyingar síggja ríkis-stø›una vi› ø›rum eygum, og vit meta hetta ver›a eitt mál av stórum t‡dningi, men søgan er ein onnur, tá i› tosa› ver›ur vi› danan á gøtuni.

Hann er líkagla›ur, um Føroyar eru innan- ella uttanfyri ríkisfelagsskapin. Danir eru troyttir at hoyra uppá okkara tvætl, sum ongan endan tykist at hava.

Dupultur moralur

Vanligi danin vil sleppa av vi› okkum, og spurningurin er, um hann ikki sleppur av vi› okkum innan stutta tí›. Landsst‡ri› avgerr dagin, tá i› vit skulu veittra farvæl.

Danska stjórnin hevur bjó›a› okkum at ver›a ver›andi innan ríkis-karmarnar samstundis, sum hon eisini er sinna› at gera broytingar í á-vísum vi›urskiftum fyri at gera ta› meira gagnligt fyri føroyingin og meira spennandi fyri føroyska politkkaran (uttanríkismál, fiskivinnuavtalur o.s.fr.).

Men, nei, landsst‡ri› sær bert sítt “fata morgana”, og vil sjálvt sleppa at st‡ra, hava fult vald, og samstundis hava stu›ul frá Danmark í ø›rum vi›urskiftum. Í sambandseygum er hetta einki anna› enn dupultur moralur.

Sjálvst‡risrúsurin tykist heldur ongan enda at fáa. Samstundis eru sambandsfólk farin at skilja, at hetta er ein politikkur, i› er bygdur upp av kenslum og ikki “sunnum fornufti”

Djúpa grundgevingin

Heimast‡rislógin sigst ver›a ov gomul og ótí›arhóskandi, men tíverri hevur eingin givi› nakra gó›a og djúpa grundgeving, hví hon skal broytast, og hvørjir setningar skulu strikast ella skiftast út vi› anna› or›alag.

Um totalt fullveldi kom, vildi veri› upplagt at avskaffa heimast‡rislógina, men so leingi sum vit ver›a ver›andi í kongaríkinum, hava felags valuta o.s.fr., ver›ur talan bert um eina uppdatering av núverandi skipan.

Um ein ella tvær reglur skulu uppdaterast, so er ta› kanska alt, men tær gó›u grundgevingarnar eru miki› sakna›ar í øllum i framtí›ar -kjakinum.

Fram-provokera›ur problematikkur

Spurningurin er, um okkara politkkarar ikki hava framprovokera› ein fiktivan ríkisrættarligan problematikk vi› heimast‡rislógini og ríkisfelagsskapinum, t.v.s. ein problematikk, sum als ikki er til sta›ar í veruleikanum.

Ta› tykist sum, at Sambandsflokkurin/Javna›arflo kkurin og landsst‡ri› hava yvirbjó›a› hvønn annan vi› bestu ríkis-uppskotunum og alla tí›ina royna at tosa fyri hvør sínari sak hesum vi›víkjandi.

Hvør einstakur flokkur hevur eitt uppskot uppá framtí›arstø›u Føroya, og alla tí›ina royna flokkarnir at siga seg hava bestu loysnina uppá stóra trupulleikan. Men hvar er tann stóri trupulleikin, sum tykist uppdikta›ur úr einum enda í annan?

Vit hava ongan trupulleika í ríkisfelagsskapinum. Ta› var trupulleikin hjá flokkunum, sum komu til valdi› vi› seinasta løgtingsval.

Trupulleikin kann skjótt blíva veruleiki, tá i› danska stjórnin kemur uppí vandaspæli›. Ikki fyrr enn tá tosa vit um veruligan vanda fyri frælsi, í ríkisfelagsskapinum.

Dana-hugsan

Vit mugu skilja dana-hugsan og dana-uppfatan av okkum føroyingum. Vit mugu ikki halda okkum ver›a naka› serligt. Danin er líkagla›ur, um vit eru inni ella úti, innanfyri ríkisfelagsskapin ella uttanfyri hann.

Í løtuni eru vit eitt ríkisfólk vi› føroyingum, grønlendingum og dønum, og saman hava vit 3 ymisk mál og heilt ymsik áhugamál. Allíkavæl hava allir partar brúk fyri hvørjum ø›rum. Saman standa vit jú sterkari. Ta› er fakta.
Danir kundu fyri langari tí› sagt føroyingum farvæl,, um teir høvdu hug til ta›, men teir valdu at hjálpa einum brø›rafólki nor›anfyri.
Danir hava givi› okkum hollan stu›ul gjøgnum í nógv Harrans ár og vónandi heldur hetta fram í nógv ár afturat.

Ræ›uligar avlei›ingarnar

Ynskja føroyingar at melda seg úr ríkisskipanini, fer hetta at fáa ræ›uligar avlei›ingar fyri okkum øll.

Grundgevingin fyri at melda okkum út úr ríkisfelagsskapinum er og ver›ur tann uppdikta›i trupulleikin, sum omanfyri r nevnt og so tann kenslubundni politkkurin.

Ta› ber ikki til at standa uttanfyri og innanfyri í senn, tí hetta ver›ur ongantí› samtykt av danska fólkinum. ta› er eisini væl skiljandi. Bá›ir partar skulu fáa naka› burturúr ríkisfelagsskapinum - ikki bert tann føroyski parturin, sum landsst‡ri› leggur upp til.
Danska stjórnin fer neyvan at gó›taka einar Føroyar uttanfyri felagsakapin, har Føroyar hava rætt til núverandi ágó›ar:

- ES pass (atgongd til allar útbúgvingar og arbei›i í ES)
- Útbúgving av føroyingum í Danmark
- SU (Statens Uddannelsesstøtte)
- Fría atgongd til Ríkissjúkrahúsi›
- Blokkstu›ulin
- Umbo›sstovur í øllum heimsins londum
- Verjuna
- Danskan valuta
- Kongshús
- Atgongd til donska sosialu trygdarskipanina

Vit hava ta› avbera gott. Ta› er kanska høvu›strupulleikin vi› trupulleikanum. Longu nú tykjast Føroyar gjalda fyri at valda. Ta› sæst tí›iliga hvønn tann einasta dag, og ta› er hetta, sum er so syrgilgt fyri okkara land.

Michael Jensen
Forma›ur í
Unga Sambandi›



(framhald)

Vi›merkingar til Bjørn á Heygum 2

Bjørn á Heygum hevur púra rætt í, at vit vóru ósamdir, bæ›i tá i› talan var um hvønn fíggjarpolitikk vit skuldu reka, og um ríkisfelagsskapin. Ta› eydna›ist at fáa undirtøku fyri mínum fíggjarpolitikki, og ta› eri eg fegin um. Ta› eydna›ist eisini at fáa undirtøku fyri mínum sambandspolitikki. Ta› eri eg eisini fegin um.

Hvussu skili› hev›i veri›, um Bjørn fekk undirtøku fyri tí, hann ynskti, dugi eg illa at ímynda mær. Eg sá ongantí› nøkur ítøkilig uppskot frá honum sjálvum. Bjørn kom ikki vi› konkretum uppskotum, sum elvdu til tann dialog, n‡hugsan og dynamikk, sum hann eftirl‡sir í greinini. Bert álop og bakbit, um at vit skuldu laga okkum eftir Fólkaflokkinum. Tá var Fólkaflokkurin ta› heilt stóra ljósi›, eins og Javna›arflokkurin er ta› í dag.

Nøkur heilt fá dømi

Fyri at grundgeva fyri, at eg ikki dugi at síggja, at Bjørn minnir so nógv um teir gomlu, Andrass Samuelsen, Kristian Djurhuus, Jóhan Poulsen v. fl., sum hann sjálvur vil vera vi›, skal eg nevna nøkur dømi um arbei›slag hansara me›an hann sat í løgtinginum fyri Sambandsflokkin.

1. Sum n‡valdur tingma›ur, bjó›a›i Bjørn á Heygum, sjálvur annar, Sjónvarpinum inn í privathús, har teir bá›ir, aftanfyri ryggin á teimum afturvaldu tinglimunum, vóru í fer› vi› at gera sítt egna samgonguskjal. At sagt naka› anna›, enn at hetta bar brá av fólkaflokspolitikki, hev›i veri› at fornerma núverandi landsst‡rismann í vinnumálum.

2. Hóast Sambandsflokkurin í valstrí›num gav lyfti um, ikki at lækka táverandi lønir vi› lóg, leyp Bjørn beinanvegin yvir í fólkafloksleypin.

3. Bjørn mótarbeiddi frá byrjan av vi› hond og fót kravinum hjá Sambandsflokkinum, um at fáa eina politiska loysn av bankamálinum. Í dag kann ongin vera í iva um, at vit fingu eina politiska loysn. Til ta› seinasta mótarbeiddi Bjørn sum umbo› fyri Sambandsflokkin, at semja skuldi fáast um samrá›ingaruppleggi› til bankamáli›.

4. Bjørn leyp frá til fólkatingsvali›. Ta› sigst at sambandsveljarar í Su›urstreymoy vóru ørkymla›ir av, at hann mælti teimum til at velja Óla Breckmann. Uttan mun til hetta, so hevur Bjørn høvu›sábyrgdina av, at Sambandsflokkinum tørva›i umlei› 180 atkvø›ur í at fáa mann valdan, og harvi› at fáa Uffa Ellemann-Jensen til danskan forsatisrá›harra, vi› Sambandsflokkinum sum tunguni á vágskálini á fólkatingi.

5. Bjørn leyp ikki bara frá til løgtingsvali›. Hann mótarbeiddi Sambandsflokkinum av øllum alvi í valstrí›num, vi› síni útspillandi skriving.

6. Bjørn var ein av oddamonnunum í ætla›a ”kvettinum” í Sambandsflokkinum, har forma›urin skuldi koyrast frá, beint á›renn hesin skuldi samrá›ast vi› ríkismyndugleikarnar um sera t‡›andi mál. Men baklandi› í Sambandsflokkinum seg›i nei til hesa rá›ager›.

Mín áheitan á Bjørn

Gó›i Bjørn. Vilt tú líkjast teimum gomlu og farnu sambandshetjunum, so eigur tú at gevast vi› tíni, fyri Sambandsflokkin oy›ileggjandi skriving. Almenn álop, bakbit og útspilling loysa ongi mál.

Ætlar tú at gera teg galdandi í flokkinum, so tosa tína søk sum vit onnur. Hetta eigur at ver›a gjørt á innanh‡sis fundum, og vi› a›rari innanh‡sis ávirkan, og ikki í fjølmi›lunum. Hetta vistu teir gomlu, og hetta arbeiddu teir eftir. Ta› sama er galdandi fyri okkum í dag.

Edmund Joensen

www.sosialurin.fo

Grindamannafundur í Vestmanna

Grindamannafelagið skipar í vetur fyri upplýsandi fundum ymsastaðni í landinum. Upprunaliga var ætlanin, at hava fundirnar í ár í Norðuroyggjum, Eysturoy og Sandoy, og komandi ár í hinum grindaøkjunum. Men felagið hevur víðkað fundarvirksemið í ár nakað. Mánakvøldið tann 31. januar verður grindamannafundur í Skúlaauluni í Vestmanna. Fundurin byrjar klokkan 20.00. Felagið hevur sett saman eina áhugaverda og fjølbroytta skrá, ið sær soleiðis út:

- Jústines Olsen, djóralækni, kunnar um tað at drepa grind
- Anna Maria Norby, landmátari frá Landsverkfrøðinginum, greiðir frá botnviðurskiftum á hvalvágunum vestanfyri
- Doreta Block greiðir frá grindakanningum og framhaldandi grinda-/hvalakanningum, og hvørjar ætlanir eru í ár
- Ivan Klein Olsen, sýslumaður, kunnar um ymiskt í hansara øki
- Regin Jespersen, sýslumaður í Vágum, greiðir frá úr sínum øki
- Finnbogi Joensen, grindaformaður í Vestmanna, greiðir frá ábótum á hvalvágna í Vestmanna

Fundirnir eru almennir. Øll eru vælkomin at lýða á og seta fram spurningar, og vónandi verður eitt gott orðaskiftið á fundinum, sum eisini kann birta upp undir eitt víðari prát úti í bygdunum aftaná. Eitt av endamálunum við hesum fundunum er at seta í gongd eitt lokalt prát um grind, seta ungar kreftir við, har teir/tey gomlu mugu geva frá sær. So ein áheitan á øll tey ungu: komið tit eisini við á fundirnar, tí vit eldru og gomlu vilja fegnir seta ungar kreftir við, læra tykkum upp, so tit eisini kunnu bera henda partin av mentan okkara víðari. Og so mugu vit ikki gloyma alt matvirðið, ið er í eini grind. Hesin matur skal í allar mátar handfarast soleiðis, sum tað sømir seg í einum framkomnum samfelagi.

Altso grindamannafundur í Vestmanna mánakvøldið 31. januar klokkan 20.00 í skúlahøllini í Vestmanna Skúla.

Føroyar á donskum ella Danmark á føroyskum

Sjúrður Skaale, cand.scient.pol., heldur fyrilestur, ið hann kallar:

Føroyar á donskum ella Danmark á føroyskum.

Hetta er fimti fyrilestur í røðini við evnum m.a. úr Hvítubók.

Sjúrður Skaale er útbúgvin samfelagsfrøðingur. Hann hevur mest starvast sum tíðindamaður, men er í løtuni í fyribilsstarvi á Løgmansskrivstovuni.

Fyrilesturin snýr seg um, hvussu samanblandingin av føroyskum og donskum á øllum økjum í samfelagnum ávirkar mentan og fólkahugsan í Føroyum.

Spurt verður, um hesin klovningur skapar tvílyndi og undirlutakenslur, ella um hann kanska er ein styrki fyri tjóðina.

Eisini verður komin inn á, hvussu tað ávirkar okkara politisku hugsanir og atferð, at vit eru undir donskum valdi.

At enda verða tær politisku broytingar, sum nú standa fyri framman, tiknar til umrøðu. Spurt verður, hvønn týdning hesar broytingar kunnu fara at hava, sæð úr einum politiskum og einum mentanarligum sjónarhorni.

Sjúrður Skaale heldur fyrilesturin um evni úr Hvítubók

Sí eisini heimasíðuna www.sleipnir.fo/setur/tiltoek

Fyrispurningur um serskatting av hjúnum

Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið um serskatting av hjúnum í hesi tingsetuni? vil Flemming Mikkelsen hava at vita frá fíggjarmálaráðharranum

ÓLAVUR Í BEITI

Í viðmerkingunum til fyrispurningin, sigur sambandsmaðurin Flemming Mikkelsen, at fyri árum síðani legði Sambandsflokkurin uppskot fyri Løgtingið um serskatting av hjúnum. Uppskotið fekk ikki undirtøku og fall. Síðan eru royndir gjørdar, uttan komið er á mál.

– Ein kann spyrja, hví Sambandsflokkurin ikki hevur framt málið um serskatting av hjúnum, tá flokkurin hevur myndað landsstýrið. Svarið er, at hvørja ferð, boð hava verið eftir Sambandsflokkinum at mynda landsstýri síðan fyrst í 80'unum, hevur landið verið um at fara av knóranum. Hvørja ferð komið er nøkunlunda á rættkjøl aftur, er Sambandsflokkurin settur uttanfyri.

Risaavlop

– Nú skjótt 2 ár eftir, at Sambandsflokkurin varð settur uttanfyri aftur, sigst, at so væl kom burturúr, at landskassin hevur millum hálva og heila milliard krónur í avlopi árliga, so ikki kann sigast annað enn, at væl varð lagt til rættis árini 1994-98.

– Um serskatting av hjúnum, har annar hjúnafelagin av ein hvørji orsøk er heimaarbeiðandi, varð sett í verk, og har inntøkan t.d. verður javnað upp til kr. 140.000, hevði hetta í fyrstu atløgu kostað landskassanum umleið 28 – 30 mió. kr. árliga, men hevði minkað so hvørt,



sum trivnaðurin øktist.

Og at enda sigur Flemming Mikkelsen, at við føroysku familjuni og risaavlopi landskassans í huga stur hann landsstýrismanninum í skattamálum, Karsten Hansen, henda spurning.

STÓRT LUNDAKVØLD
Á HOTEL NORÐ

Leygarkvøldið 5. februar kl. 19.00

Skipað verður fyri stórum hugnakvøldi á Hotel Norð.

Borðreitt verður við trimum rættum.

Felagssangur verður undir borðhaldinum og Hans Hjalti Skaalum og aðrir undirhalda.

Aftaná borðhaldið verður farið upp á gólv. Limir úr Klaksvíkar Dansifelag luttaka.

<u>Bussamband:</u> Um bussur ynskist norð kl. 18.25 kann sigast frá. Bussamband er til Klaksvíkar kl. 24.00.

Kostnaður fyri kvøldið er kr. 220,- pr. pers.

Tekning áðrenn fríggjadagin 4. febr. kl. 12.00 á tel. 451244 - 451070 - 286670.

Gisting á dupultkamari kr. 550,- fyri bæði. Einkultkamar kr. 450,- fyri ein.

Til matna
FORRÆTTUR:
Fiskatallerkur
HØVUÐSRÆTTUR
Stokt lundabringa úr seyðtorvu
OMANÁ:
Dessert og kaffi

Hotel Norð
Tel. 451244 - Fax 451245 - FO 750 Viðareiði

Sosialurin - 311820